Dagf. 29. april 2015

Niðanfyri eru stuttar frágreiðingar um ymiskar tryggingar fyri børn:

**Privatábyrgdartrygging**
Privatábyrgdartrygging er ein trygging sum flest øll foreldur hava í eini innbúgvstrygging og vilja skaðar sum børnini kunna ábyrgdast fyri koma undir hesa trygging.

At skúlin so teknar eina vinnuábyrgdartrygging er fyri at ongin skal detta niðurímillum, um so skuldi verið at næmingurin ikki er umfataður av aðrari trygging. Ein klasulur á vinnuábyrgdartryggingini sum skúlin teknar er soljóðandi: **Tryggingin svarar undir teimum vanligu treytunum í tryggingarskjalinum fyri næminganna/barnanna persónligu ábyrgd ta tíðina stovnurin hevur umsjón við teimum. Onnur ábyrgdartrygging skal tó ganga framum.**

**Arbeiðsskaðatrygging**
Fólkaskúlanæmingar í starvsvenjing eru ikki umfataðir av Arbeiðsskaðalógini, men er tó møguleiki fyri at tekna trygging samsvarandi hesi lóg, soleiðis at næmingarnir fáa rætt til veitingar eftir Arbeiðsskaðalógini.

Hetta slag av arbeiðsskaðatrygging kostar kr. 110,00 pr. næming. Trygging er ein leypandi trygging t.v.s. ein árlig trygging. Tryggingin verður teknað við tí hægsta næmingatalinum ið verður sent út frá skúlanum.

<u>Vinnuábyrgdartryggingin og arbeiðsskaðatryggingin</u> eru ikki lógarkravdar, so tað er upp til skúlan sjálvan um skúlin vil teknað tryggingarnar.

**Felags vanlukkutrygging**
Kommunurnar kunnu tekna hesa felags vanlukkutrygging fyri skúlanæmingar har veitingin er kr. 25.000 við deyð og upp til kr. 500.000 við avlamni. Tryggingin dekkar eisini fyri børn í starvsvenjing.

29-04-2015

**Viðvíkjandi  vanlukkutrygging av skúlabørnum og børnum í ansing.**

| Tryggingarfulnaður: | Upphædd |
|---|---|
| Útgjald við deyða | 25.000 kr |
| Endurgjald við avlami | 500.000 kr |
| Tannskaðar upp til | 25.000 kr |

Eisini umfatar tryggingin brilluskaðar.

Fyri læknafrøðiligt avlami verður útgoldið stighækkandi endurgjald, tá avlamisprosentið fer upp um 30%. Tað vil siga, at leiðir vanlukkutilburðurin til avlamisstig 40% verður útgoldið 40% av kr. 500.000, sum er kr. 200.000. Afturat hesum verður 40% av kr. 200.000 sum er kr. 80.000 útgoldið. Endurgjaldið við 40% avlami verður íalt kr. 280.000. Við 100% avlami verður útgoldiðkr. 1.000.000 frá vanlukkutryggingini.

**Hvat er ein vanlukkutilburður?**
Vanlukkutilburður er at skilja sum ein tilvildarlig, óvart bráðkomin ávirkan uttan ífrá, ið hevur eyðsæddan likamskaða við sær.

**Hvar tekur tryggingin við?**
Tryggingin fevnir um vanlukkutilburð, sum hendir í skúlanum og í Kommunalari ansing. Eisini fevnir tryggingin um vanlukkutilburð, ið hendir á útferðurum o.ø. sum er fyriskipað av skúlanum/aningarstovninum.

Tryggingin er teknað sambært treytunum frá september ´10 um vanlukkutrygging. Kann heintast á heimasíðu Tryggingarfelagsins.

**Aðrar upplýsingar frá Kommunufelagnum:**

Allir næmingar í fólkaskúlanum (10. flokkur íroknaður) eru umfataðir av vanlukkutryggingini.

Skúlabørn sum fara í frítíðaransing áðrenn og aftaná skúlatíð:

Hesi børn skulu íroknast talinum fyri fólkaskúlan, og skulu tit tí ikki taka tey við í "
tal á børnum í ansing". Børnini eru tó umfatað av somu treytum sum "børn í ansing", tá tey eru í frítíðarskúla.

Limirnir verða bidnir at venda sær til Tryggingarfelag Føroya at melda skaðar.